Föroya Bjór

FÖROYA BJÓR P/F
KLAKKSVÍKSVEGUR 19
POSTBOKS 4
FO-710 KLAKKSVÍK
FAROE ISLANDS
PHONE: +298 475454
FAX: +298 475455
FB@FOROYABJOR.FO

05. januar 2024

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið.
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Svarskriv frá Føroya Bjór, til Uppskot til Løgtingslóg um pantskipan fyri íløt og uppskot til kunngerð um pantskipan fyri íløt til ummælis.

Vit loyva okkum, at koma við hesum ummælið, til uppskotini til lóg og hartil hoyrandi kunngerð um pantskipan fyri íløt.

Vit skilja at høvuðsendamálinum við uppskotinum til lógina er, at viðskiftafólk skulu sleppa av við øll síni pant áløgdu íløt á einum og sama stað.

Trupulleikin at viðskiftafólk ikki sleppa av við øll síni pant áløgdu íløt á einum og sama stað skyldast, at tað verður innflutt sama vøra frá ymiskum veitarum, við ymiskum strikukotum.

Vit skilja als ikki, at fyri at uppfylla høvuðsendamálið, so skal ein eyka skattur/avgjald leggjast á Føroya Bjór uppá kr. 4.000.000. Føroya Bjór hevur seinastu 3 árini havt árligt úrslit niðanfyri hesa upphædd, og tað kann als ikki góðtakast.

Føroya Bjór hevur onga ábyrgd av trupulleikanum. Vit hava eina vælvirkandi skipan við innheintan av okkara íløtum. Við verandi lóg hevur Føroya Bjór havt eitt returprosent omanfyri 94%. Vit meta ikki, at hetta kann vera hægri.

Vit eru sera væl nøgd við tað arbeiði, ið IRF ger við at savna og viðgera burturkast, men hetta lógaruppskot leggur upp til ein blankochekk til IRF, frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, fíggjað av ma. Føroya Bjór.

- Tað er ásett í lóg at IRF skal fáa 0,50 kr. í ómaksgjaldið fyri hvørt pant álagt ílat, ið verður innflutt ella framleitt í Føroyum
- IRF fær ágóðan av yvirskotspanti, sum ikki verður innlatið aftur.
- IRF kann selja brúkt íløt til endurnýtslu

Tað er ásett í lógini, at IRF skal vera pantumsitari. Vit skilja ikki, at ikki verður lagt upp til at søkja um alment útboð til pantumsitara heldur enn at áseta ein valdan umsitara í lóg.

Tað er eisini ásett í lógini, at rakstrargjaldið skal vera 0,50 kr. Til samanbering kann viðmerkjast at Dansk Retursystem krevur eitt rakstrargjald á 0,00 kr. pr blikk og 0,06 kr. pr PET fløskur, og hevur yvirskot. (sí bilag 1)

Í kunngerðini fær IRF heimildir til at taka avgerðir, ið ikki kunnu kærast.

Föroya Bjór

Vit gleðast um, og síggja tað sum eina sjálvfylgju, at lógin leggur upp til, at so nógv íløt sum gjørligt skulu vera fevnd av lógini um pantskipan fyri íløt.
§1 í kunngerðini verður víst á fleiri nummur í toll- og vøruskránni. Men vit undrast á, at tað verður víst á somu tollnummur fleiri ferðir, og víst á ávíst innihald. Vil tað so siga at td. torskild 2202.99.19 (Íste) er ikki fevnd av pantskipanini? Er td. pant á Cocio ella FIT hjá MBM?
Hesar ásetingar meta vit vera ov torskildar.

FÖROYA BJÓR P/F
KLAKKSVÍKSVEGUR 19
POSTBOKS 4
FO-710 KLAKKSVÍK
FAROE ISLANDS
PHONE: +298 47545·
FAX: +298 475455
FB@FOROYABJOR.FO

Vit halda, at pant skal vera nemt og greitt fyri viðskiftafólk og handlar. Tað skal síggjast á ílatinum, um tað hevur pant ella ikki. Hetta kann gerast við lóg, at á hvørjum pant áløgdum ílati, ið verður selt í Føroyum, skal vera eitt føroyskt pantmerkið. Tað Føroyska pantmerkið skal greitt tilskila, um pant er álagd og hvat virði á pantinum er. Hetta vil greiða fleiri ivamál, hjá viðskiftafólki og sølustøðum.

Dansk Retursystem hevur sítt egna pantmerki, sum við lóg ikki er loyvt at útflyta.
Í viðmerkingunum til §5 verður boða frá, at Umhvørvismálaráðið samráðist við Miljøminiseriet, at gera tað lagaligari fyri føroyskir innflytara at umgangast Dansk Retursystem.

Lógin leggur eisini meinbogar fyri útflutning hjá føroyskum framleiðarum. Framyvir skulu vit rinda pant og rakstrargjald til IRF, fyri hvørt ílat vit útflyta, fyri síðan at standa við hattinum í hondini uttanfyri hjá IRF, og pent spyrja um vit kunnu fáa peningin aftur frá teimum. Um IRF sigur nei, so kann tann avgerðin ikki kærast. Hetta skapar meiri bureaukrati enn gott er.

Vit eru skelkaði av, at tann Føroyska framleiðsluvinnan verður áløgd ein nýggjan skatt, fyri at koma til lívs ein trupulleika, ið tann Føroyska framleiðsluvinnan onga lut eiga í. Slíkt lógarsmíð hevði ikki komið fyri í t.d. Íslandi.

Vit eru altíð til reiðar, at møta til hoyring í løgtingsnevnd til nærri frágreiðing.

Heilsan
Föroya Bjór

Einar Waag
stjóri

Bilag 1

LM-091/2023

DANSK RETUR SYSTEM

Driftsgebyrer 2024

Det danske pant- og retursystem er finansieret af gebyrer, som producenter og importører skal betale for hver enkelt emballage med pantbelagte drikkevarer, de sælger, udleverer eller på anden måde overdrager på det danske marked. Gebyrerne afhænger af emballagens volumen og materiale, og om det er en genpåfyldelig flaske eller en engangsemballage.

Gebyrerne godkendes hvert år af Miljøministeriet efter reglerne i pantbekendtgørelsen (Bekendtgørelse nr. 626 af 30. maj 2023 om pant på og indsamling med videre af emballager til visse drikkevarer).

Dansk Retursystem har gennem de seneste år haft øget fokus på cirkulær økonomi og har derved udbygget kravene til, at hver enkelte emballage bærer sine egne omkostninger, godskrevet værdien fra salget af emballagens materiale. Gebyrfastsættelsen for 2024 fortsætter dette fokus.

Gebyrerne består således af faste driftsgebyrer for emballagetyperne, med tillægsgebyrer på emballager, hvor der er meromkostninger, som der særligt er forbundet med indsamlingen af denne emballage eller i form af en lavere salgspris i forbindelse med genanvendelse. Dette er også gældende for emballager, som der betales gennemsnitsgebyrer for.

Betaling

Driftsgebyr betales for hver solgt emballage. Betalingen sker månedligt ud fra rapportering af det faktiske salg. Produkter og emballager, der skal markedsføres i Danmark, skal være tilmeldt Dansk Retursystem. Den første emballagetilmelding i et kalenderår koster 2.000 kr. eksklusiv moms. Flere tilmeldinger samme år er gratis.

Genpåfyldelige flasker

For genpåfyldelige flasker betales der et driftsgebyr for salg til butikker. Det skal dække omkostningerne til udbetaling af håndteringsgodtgørelse til butikkerne.

Læs mere

For nærmere gennemgang af de forskellige måder at rapportere og opkræve gebyrer på kan I læse mere på danskretursystem.dk under For virksomheder.

På næste side kan I se de gældende driftsgebyrer for 2024.

DANSK RETUR SYSTEM

Driftsgebyrer for engangsemballager 2024 (øre/stk.)

Materialetype	Nettoindhold	Driftsgebyr	Materialetype	Nettoindhold	Driftsgebyr	Materialetype	Nettoindhold	Driftsgebyr
Aluminium	0,15	0	Plast	0,16	4	Glas	0,05	26
	0,20	0		0,17	4		0,10	28
	0,23	0		0,20	5		0,18	31
	0,24	0		0,25	5		0,20	32
	0,25	0		0,27	5		0,23	34
	0,27	0		0,30	5		0,24	34
	0,28	0		0,33	5		0,25	35
	0,30	0		0,36	6		0,26	35
	0,31	0		0,38	6		0,27	36
	0,32	0		0,40	6		0,28	36
	0,33	0		0,42	6		0,30	37
	0,34	0		0,43	6		0,33	38
	0,35	0		0,44	6		0,34	39
	0,36	0		0,45	6		0,35	39
	0,38	0		0,50	6		0,36	40
	0,40	0		0,55	7		0,37	40
	0,44	0		0,60	7		0,38	41
	0,45	0		0,65	7		0,44	43
	0,46	0		0,70	7		0,45	44
	0,47	0		0,75	7		0,47	45
	0,48	0		0,80	7		0,48	45
	0,49	0		0,85	7		0,50	46
	0,50	0		0,90	7		0,63	52
	0,55	0		0,98	7		0,64	52
	0,57	0		0,99	7		0,65	53
	0,70	0		1,00	7		0,66	53
	0,75	0		1,03	7		0,67	54
	0,90	0		1,20	7		0,70	55
	0,95	0		1,25	7		0,75	57
	1,00	0		1,28	7		0,98	68
				1,35	7		1,00	69
Stål	0,25	7		1,40	7		1,50	92
	0,33	6		1,50	6		2,00	114
	0,34	6		1,75	6		3,00	163
	0,35	6		1,90	6		6,00	302
	0,60	4		2,00	6		9,00	459
	0,65	4		2,50	5			
	0,90	0		3,00	41			
	1,00	0		5,00	69			
	2,00	0		6,00	80			
	4,80	57		7,00	91			
	5,00	57		10,00	170			

Cirkulærøkonomisk tillægsgebyr

Plastemballager		Tillægsgebyr uden moms (øre/emballage)
	Transparent mørkeblå & grøn	8
	Øvrige farver	12
	Sleeve	12
	Komposit	8
	Spærrelag	12
	PVC	23
	PE	12
	PP	12
Aluminium		
	Sleeve af plast	5
	Komposit	7
	Papiretiket	5
	Sleeve af PVC	22
Glas		
	Sleeve	2
	Lukning - patentprop af porcelæn	68
	Lukning - fastgjort plast mm.	68
	Lukning - patentprop af plast	10
	Sleeve af PVC	10
STÅL		**4**

Hvis en tilmeldt engangsemballage har et nettoindhold, der ikke fremgår af skemaet, bliver gebyret beregnet særskilt, og I får direkte besked af Dansk Retursystem. Derudover kan der forekomme andre individuelle gebyrberegninger, hvis særlige forhold gør sig gældende for den pågældende emballage, fx i forhold til håndtering og genanvendelse af materialet I så fald får I også direkte besked.

For pris på pantetiketter se 'Gennemsnitsgebyrer og pantetiketter 2024.

Driftsgebyrer for salg af genpåfyldelige flasker 2024

Materialetype	Driftsgebyr uden moms (øre/emballage)
Glasflasker	5
Plastflasker	7